

MYND: ANTON HØJGAARD

*Guðrið Hansdóttir – ein av virknu songkvinnunum í Føroyum*

# Tónleikarar verða heiðraðir

**STÓRA** GALLATILTAKIÐ **PLANET AWARDS** VERÐUR HILDIÐ Í **DEEP** Í HAVN MIKUKVØLDIÐ **29. DESEMBER**, OG TÁ VERÐA TEY **BESTU** Í FØROYSKUM **TÓNLEIKI** FARNA ÁRIÐ **HEIÐRAÐ**. PÁLL FINNUR PÁLL OG ANNA FAROE VERÐA MILLUM TEY, SUM **SPÆLA** LIVE



**PLANET AWARDS**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Miðlahúsið fer aftur í ár at finna tey bestu í føroyskum tónleiki farna árið.

Seks Planetir skulu latast føroyskum tónleiki. Heiðurslønir verða lætnar til besta bólk/einstakling, besta sangara, bestu songkvinnu, bestu fløgu, besta sang og besta nýggja bólk.

Eisini verður eitt serligt Planet herðaklapp latið til onkran, sum avrikið nakað serligt í føroyskum tónleiki.

Sum nakað nýtt verða eisini heiðurslønir lætnar fyri bestu føroysku YouTube video og bestu føroysku tónleikamyndina. Kappingin um bestu tónleikamyndina frá 2010 er fyri øll, og fólk eru vælkomin at senda myndir til og øll kunnu senda myndir inn. Myndir kunnu sendast til planet@ras2.fo – vinnarin fær 5.000 krónur í vinningi.

## Live framførslur

Planet Awards bjóðar eisini stóra gallaveitslu eftir handaninar, og nógvir livetónleikur verður eisini at hoyra kvøldið. Higartil er kunngjørt, at ársins bólkur á Planet Awards í fjør, Páll Finnur Páll, fer at spæla live, eisini Anna Faroe, stóra føroyska navnið í Danmark farna árið, fer at framføra, og teir tríggir Filip Mortensen, Petur Háberg og Uni Debes fara eisini at spæla. Onnur fara eisini hava live-framførslur – millum annað fara nakrir av bestu trubadurunum í Føroyum fara at spæla í niðaru hæddini á Deep.

Atgongumerki til Planet Awards 2010 kunnu keypast í Miðlahúsinum og í Baresso.

Rás2 sendir beinleiðis frá Planet Awards frá kl. 21.00 mikukvøldið 29. desember.

## KLUMMAN



*Inna Törnroos*

# Besta jólagávan!

Friður á jørð og í menniskjum góður tokki...

Prestur læs vælkendu orðini, men sjálv vildi eg onki annað enn at sleppa heim at lata upp forvitnisligu gávuna, sum eg hevði fingið eygað á inni í pultikamarinum.

Mamma kendi okkum og lat ikki jólagávurnar liggja frammi undir jólatrænum. Hóast vit systkini væl vistu, at man ikki skuldi lúra, áðrenn dunnan var etin og mandlan funnin, vóru lítlu fingrarnir ofta frammi og pilkaðu í eitt horn, ristu og føldu uppá gávurnar.

Hesi jólini vóru serlig. Eg var 9 ár og hevði fingið mín fyrsta pennavin (teir gjørdust nógvir komandi árini). Ein vinkona hevði lánt eina skrivimaskinu frá pápa sínum, og eg var so hjartans øvundsjúk. Ein skrivimaskina var hægsta ynskið, men líka høgt, sum hon var ynskt, líka lítið væntaði eg at fáa hana. Tí hvar skuldi mamma finna eina skrivimaskinu í Sørvági?

Mín sjónarringur rakk ikki serliga langt út um Sørvág og Vágoynna.

Tá pakkarnir komu undir jólatræið var tað ikki, sum hjá nógvum øðrum, (og sum vit eisini gera nú) at vit sótu fitt og bíðaðu, til vit fingu ein pakka og síðani hugdu áhugað eftir, hvat beiggi ella systi fekk. Nei, vit lupu á pakkarnar sum svangar leyvur eftir einum bita av kjøti. Eftir 10 minuttir vóru allar gávurnar pakkaðar upp, og vit vóru í gleðisrúsi. So mikið av skili var tó í, at størsta gávan var goymd til síðst.

Eg minnist kensluna, sum tað var í gjár, tá eg fekk eygað á teir gráu tangentarnar. Ein lítil grá skrivimaskina var í størsta pakkanum, og gleðin var fullkomin. Mamma hevði biðið syskinabarnið, ið búði í Danmark, keypa skrivimaskinuna og taka hana heim við til jóla.

Komandi mánaðirnar gjørdi eg ikki annað enn skriva brøv og søgur. Pennavinirnir fingu ikki eitt handskrivað bræv – alt var maskinskrivað.

Eri rættuliga vís í, at henda jólagávan hevði stóran leiklut í mínum komandi lívi. Tí við hesi skrivimaskinu bleiv eg »skrivandi-Inna« og tí søgdu fólk við meg »Jamen, Inna, tú skalt blíva journalist«. Ikki tí eg visti eitt petti um, hvat journalistar gera, men tá øll søgdu við meg, at tað var tað, eg burdi blivið – ja, so var ikki at siga ímóti!

Skrivimaskinan varð væl brúkt, tá hon andaðist eini fimm ár, eftir at hon var útpakkað.

Spurningurin nú er bara, hvussu ein finnur eina slíka jólagávu til sini egnu børn. Ein jólagáva, sum stimbrar, vekjur áhuga og gleði í nógv ár frameftir. Ikki lætt, men um man ger, sum mamma mín og lurtar eftir børninum – so er tað kanska ikki so torført hóast alt!



## INNIHALD

2 KLUMMA: **BESTA JÓLAGÁVAN**
2 **PLANET AWARDS 2010**
4 INTERVIEW: **SJÚRÐUR SKAALE**
7 ZAREPTA: **LEIÐSLAN SVARAR ATFINNINGUM**
8 TIPS: **PYNTILIGT PYNT TIL JÓLATRÆI**
9 90 SEKUND: **JAN CHRISTIANSEN**
10 INTERVIEW: **DANJAL Á NEYSTABØ**
13 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
13 SKEMT: **Í RANGASTRÚPAN**
18 TIL ARBEIÐIS: **PIA JENSEN**
19 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK OG ANNAÐ**
20 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Sjúrður Skaale / Jens Kristian Vang